DAGSINS MEINING

Skattalygnin hjá fólkaflokkinum

Stutt fyri jól samtykti tingið broytingar í skattalógini, ið landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevði lagt fram. Landsstýrismaðurin sigur seg vóna, at »skattalækkingin« fær fakfeløg at vísa hógv í lønarkrøvum til næstu sáttmálasamráðingar. Fyri stuttum gjørdi Fólkaflokkurin ein sannan sjarmuoffensiv í miðlunum, har hann vísti á, hvussu skattatrýstið skuldi lækka munandi. Borðreitt varð við talvum, grannskoðaraútrokningum osfr. Óli Breckmann segði seg vilja hjálpa fíggjarmálaráðharranum (hereftir FMR) at fremja ta skattalækking, ið avtalað varð í samgonguskjalinum. Nú úrslitið fyriliggur, eitt satt skattapolitiskt neyðaregg, er neyvan væntandi, at fólkaflokkurin fer at útbasunera úrslitið við sama stoltleika sum sjarmuoffensivurin á Hafnia. Andstøðan legði eitt skattabroytingaruppskot fram, ið var meinlíkt tí hjá fólkaflokkinum, men Óli B atkvøddi ímóti tí uppskoti, ið hann sjálvur áður hevur reklamerað fyri í miðlunum.

Ein verkamaður, ið forvinnur 160.000 árliga, sleppur 2.300 kr. bíligari í skatti í 2001 samanborið við skattatrýstið tá henda samgonga tók við. Hetta svarar til kostnaðin av 500 litrum av olju ella ein vanligan bingovinning! Men hyggja vit at skattatrýstinum á reallønina, er als ikki talan um linkað skattatrýst undir hesi samgongu, heldur tvørturímóti. Persónligi skatturin er progressivur tvs. at tær seinastu kr. verða lutfalsliga harðari skattaðar enn tær fyrstu. Tí er neyðugt at prístalsregulera botnfrádrátt og mørkini í skattastiganum, um skattatrýstið á reallønina skal vera óbroytt. Hetta er ikki gjørt! Og tí er realskattatrýstið á vanliga løntakaran økt undir hesi samgongu. Men ivasamt er um FMR. skilur munin á nominellum skattatrýsti og realskattatrýsti.

Ávísir samfelagsbólkar hava kortini fingið ein veruligan skattalætta frá FMR. Td. legði hann fram uppskot um at lækka partafelagsskattin úr 27% niður í 20%, ið varð samtykt. Her er talan um veruliga lækking so tað munar, m.a. av tí at partafelagsskattur og vinningsbýtisskattur er sonevndur proportionalskattur. Tvs. skattatrýstið er óbroytt uttan mun til stødd á inntøku. Partafeløgini hava sostatt fingið 7% meira at luta til partaeigarar. Og tað eru tí partaeigarar, ið hava fingið størsta skattalættan frá FMR. Hesin samfelagsbólkur verður ikki vanliga mettur at vera tann, ið ringast er fyri. Men verkamannafjøldin fær ikki tær justeringar í skattatrýstinum framdar, ið eru neyðugar til tess at halda eitt óbroytt skattatrýst á reallønina. »Førast skal ein varligur fríggjarpolitikkur« plagar FMR at endurgeva úr samgonguskjalinum. Nú vita vit, at tað er skattatrýstið hjá verkamanninum, ið skal nýtast sum stýringsamboð ella termostatur í búskapinum. Partaeigarar, ið mangan eiga milliónavirði í partabrøvum, fáa bæði í posa og sekk frá FMR, ið annars umboðar ein flokk, ið smb. stevnuskránni skal eitast at verja verkamannin. Ideologiskt hevur FMR yvirhálað Óla B høgrumegin. Ein meira borgarligan skattapolitikk enn tann, ið tjóðveldisflokkurin hevur fort í Tinganesi, hava vit ongantíð áður sæð her á landi.

Broytingarnar í skattalógini, ið vórðu samtyktar fyri jól, eru ein narrisutta og FMR sigur seg vóna, at fakfeløg fara at vísa hógv til várs. Samstundis hevur arbeiðsgevarin (partaeigarin) fingið stóra realskattalækking, meðan løntakarin hevur fingið økt realskattatrýst. Tá FMR vil hava verkamannafeløgini at vísa hógv til komandi samráðingar hevur ein hug at spyrja, um hann við vilja tveitir torvmold í eyguni á verkamannafjøldini ella hann einki skilur av tí málsøki hann er settur at umsita. Hjá Ingeborg verða orð FMR óivað uppfatað sum ársins nýggjársvittigheit.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Niclas Davidsen á Skúr til áminnis

f. 19. juni 1974 – d. 25. nov. 2000

Kalt er í veðrinum – ælaveður og myrkt. Hyggi út gjøgnum vindeyga, síggi at tey seinastu bløðini eru nú dottin av trøunum og fúka nú runt í túninum. Tað skýmur, hesin dagurin fer at halla, eins og nú, bert ein lítil mánaði er eftir av hesum árinum. Vit eru komin inn í adventuna. Jólini nærkast – tíðin, tá ið øll eru glað og gleðast við familju og vinum. Men tað er ikki enn! Vit skulu ígjøgnum desember fyrst. At skula koma ígjøgnum desember, plagar væl ikki at fella nøkrum tungt, sjálvt um myrkt er størsta partin av samdøgrinum. Men nú! Stóra sorgin hevur aftur vitjað í heimbygd míni. Ein ferðsluvanlukka tíðliga leygarmorgunin 25. november, tók ein av okkara ungu. Hesin desember mánaði verður ikki lættur at koma ígjøgnum hjá tykkum, sum nú hava mist. Troystarans orð kunnu kanska hjálpa tykkum, men tit hava mist eitt tað dýrasta tit áttu. Sonur tykkara er farin. Hann er farin undan okkum og vit standa spyrjandi eftir. Spyrjandi, tí vit skilja ikki, hví hansara tími longu var komin. Men sjálvt um sorgin nývir, so er ein, ið kann hjálpa, og sum sálmaskaldið so vakurt sigur:

Tyngir á teg sorgin harða
tykist einki ljós at sjá,
til tín Guð tú tá skalt fara
altíð er har hjálp at fá;
er tín trúgv sum fjallið sterk,
virka kann hon undurverk,
senda vil Guð tær til bata
meir, enn heimsins vísu fata.

Niclas var tvey ár eldri enn eg. Aftrat tí, at vit vuksu upp í somu bygd, komu vit serliga nógv saman, tey árini vit róðu við Nólsoyingi. Stuttligt var tað og vit høvdu mangar góðar løtur saman. Trupulleikarnir vóru sjáldan so stórir, at teir ikki blivu vendir til skemt.

»Nú eru vit blivnir danskarar« er eitt tað seinasta tú segði við meg. Niclas hevur búð í Randers í nøkur ár og eg í Aalborg. Niclas skuldi læra til sløkkiliðsmann. Spenningur og vandi, útrykningur við fullari ferð – ja, eg dugi at síggja teg fyri mær.Tú hevði verið ígjøgnum alskyns royndir. Tú vísti mær ymisk diplom tú hevði fingið, einaferð eg var og vitjaði teg í Randers. Tú hevði helst funnið títt lívsstarv, og vegirnir lógu opnir fyri tær. Ætlanin mundi vera, at tú einaferð skuldi vera sløkkiliðsmaður í Føroyum.

Niclas kendi nógv, og nógv kendu Niclas. Mangan havi eg verið spurdur um eg kendi Niclas. Í Havn mundu tað vera fá, um okkara aldur, sum ikki kendu teg. Flest øll kappróðrafólk, sum róðu tá ið vit róðu, kendu ella vistu hvør tú vart. Tú tosaði við øll og fekst øll at flenna. Niclas var væl umtóktur!

Einaferð sleyrdu vit kirkjugarðin í Nólsoy, tú og eg. Tosaðu í spølni um, hvar á leið í garðinum vit einaferð komu at liggja. Báðir væntaðu vit at koma at liggja uppi við portrið, men tað kom tíverri ikki at passa.

Tað skýmir. Hesin dagurin er farin at halla. Men tín dagur endaði longu á miðdegi. Framanfyri lá allur seinnaparturin og kvøldið. Eg fekk ikki komið til jarðarferðina hjá tær, men mínir tankar eru har heima og eg takki tær fyri alt, vit høvdu saman.

Góðu tit bæði Marnar og Marianna, og tit, sum stóðu Niclasi næst. Harrin styrki og troysti tykkum, nú eingin Niclas kemur heim at vitja tykkum á jólum.

Leif

Tøkk

Øllum tykkum kæru, sum gjørdu mær 85 ára føðingardagin so hugnaligan, takki eg so hjartaliga.

Somuleiðis ynski eg øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.

Louisa Olsen, Miðvágur

Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, ið á ymiskan hátt gleddu okkum á áttati ára døgum okkara 18. august og 18. desember.

Gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

Elsa og Ingálvur av Reyni

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Gott ár hjá fiskimonnum

Í frágreiðingini til ársfundin hjá Føroya Fiskimannafelag, sum verður í morgin, fegnast formaðurin um, at árið í ár hevur roynst væl hjá nógvum fiskimonnum

ÁRSFUNDUR
Edvard Joensen

Óli Jacobsen hevur verið formaður í Føroya Fiskimannafelag triðingin av tíðini, felagið hevur verið til

Tað eru serliga teir góðu fiskaprísirnir, sum hava gjørt árið gott hjá føroysku fiskimonnunum, sigur formaðurin í Føroya Fiskimannafelg í niðurstøðuni til árfrágreiðingina, hann fer at leggja fram í morgin.

Flestu skipabólkarnir hava ein hampiliga fittan inntøkuvøkstur. Tó er ein bólkur, sum stendur í stað, meðan ein hevur væl minni inntøku enn í fjør.

Størsta vøksturin í inntøku pr. dag hava manningarnar á nótaskipunum, sum hava ein vøkstur upp á 21% í mun til fjør, meðan ísfiskalínuskipini hava eina lækking upp á 19% í inntøkuni pr. dag.

Óli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafelag, sigur í viðmerking, at tað kemst av, at nú er fiskiskapurin normaliseraður aftur, eftir at hann seinnu árini hevur verið óvanliga góður.

Hinvegin eru sera høgu prísirnir orsøkin til, at línuskipini hava hildið hesa inntøkuna.

Upp og niður

Óli Jacobsen vísir á, at í mun til 1991 tvífaldaðust inntøkurnar hjá manningum á línuskipunum í 1998, meðan tær eru lækkaðar eitt sindur aftur nú. Men samstundis er vert at leggja merki til, at inntøkan í dag er reinur fiskipartur at kalla, meðan nógv størri partur fyrr var tilskot so sum minstaløn og dagstudningur umframt frítíðarløn.

Tá ringast stóð til - í 1993 – var næstan helvtin av inntøkuni minstaløn og studningur, meðan sjálvur fiskiparturin í dag er 90% av inntøkuni.

Av hinum skipabólkunum eru tað bara rækjuskipini, sum ikki hava havt inntøkuvøkstur í mun til í fjør. Hjá teimum er støðan óbroytt. Inntøkan pr. dag er eina krónu hægri, enn hon var í 1999.

Í ársfrágreiðingini verður sagt, at Fiskimannafelagið er errið av sínum hagtølum. Bæði tað, at tey vísa eina hugaliga, fíggjarliga gongd fyri limirnar. Men eisini tað, at tey verða brúkt av øðrum. Tað hendir seg javnan, sigur ársfrágreiðingin, at áheitanir koma frá bæði almennum sum vinnuligum stovnum, sum vilja sleppa at nýta hagtølini til at gera gongdina í vinnuni upp. Mangan langt áðrenn tey almennu hagtølini fyriliggja.

Men ikki er altíð, at tey verða nýtt, sum Fiskimannafelagið ætlar, hóast tey verða útflyggjað, sigur formaðurin í ársfrágreiðingini. Og so kemur hann við eini ákoyringa á fjølmiðlarnar, sum hann sigur beinleiðis misnýta hesi hagtøl. Ársfrágreiðingin sigur soleiðis:

»Vit hava eisini verið sera lagaligir at lata hagtøl frá okkum, m.a. tey tøl sum vísa gongdina hjá hvørjum einstøkum skipi. Men her mugu vit tátta í, tí tað hevur víst seg, at hesi hagtøl av fjølmiðlunum í stóran mun verða nýtt ímóti fiskimonnum á ein hátt, sum tá "fanin lesur Bíbliuna". Tí koma vit ikki framyvir at lata fjølmiðlunum hesi hagtøl, eins og vit tilskila á hagtølunum fyri tey einstøku skipini, at hetta er til innanhýsis nýtslu, sum tað ikki er loyvt at nýta alment. Men at nýta miðatøl er sjálvandi í lagi«.

Trygdin

Vanliga er eitt ávíst tema á hvørjum landsfundi hjá Fiskimannafelagnum. Og í ár verður temaið trygd og arbeiðsumhvørvi hjá fiskimonnum.

Hetta er eitt evni, sum hevur verið frammi soleiðis av og á. Kanska serliga eftir at eitthvørt minni gott er hent, vísir Óli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafelag, á. Seinast nakað var at frætta soleiðis um evnið, var herfyri, tá tað kom upp, at ein stórur partur av bjargingarbátunum umborð á skipunum ikki riggaði, sum teir skuldu.

Slíkt er jú óhugnaligt at frætta, og verður eisini tikið í størsta álvara. Tað kann jú í ringasta føri gerast ein spurningur um lív ella deyða, sigur Óli Jacobsen.

Við allari virðing fyri donsku myndugleikunum og teirra lógum og reglum, sigur Óli Jacobsen, at hann bara noyðist at ásanna, at eitt nú íslendingar eru langt framman fyri okkum á hesum øki. Og hann vísir á, at í Íslandi finst trupulleikin ikki, tí íslendingar hava uppfunnið eina skipan, sum ger, at gummibáturin verður skotin út frá skipinum, tá brúk er fyri honum. Hendan skipan er lógarásett at vera umborð á øllum íslendskum skipum. Og kanska hevði hon verið loysnin á hesum spurninginum, sigur formaður Fiskimannafelgsins millum annað í ársfrágreiðinini.

Til at fáa vakt áhugan fyri málinum aftur, hevur Fiskimannafelagið fingið Torleiv Hoydal frá Søfartsstyrelsen og Eyðun Bert Jacobsen frá Sjóvinnufyrisitingini at koma á ársfundin í Norðurlandahúsinum í morgin at halda fyrilestrar um trygd og arbeiðsumhvørvi hjá fiskimonnum.

Samstundis vónar formaðurin, at eitt orðaskifti kann fáast í lag um evnið millum teir báðar og teir fiskimenn, sum møta á fundinum við teira praktisku royndum.

Sum vanligt hevur verið, er árfrágreiðingin frá formanni Føroya Fiskimannafelags givin út í hefti. Í ár er hon upp á 96 síður, har nógv ymisk mál verða viðgjørd. Aftalaga í heftinum er ein frágreiðing um stovnanina av felagnum fyri 90 árum síðan. Óli Peteren hevur gjørt flestu tekningarnar í heftinum.

Ársfundurin hjá Føroya Fiskimannafelag ár 2000 verður settur í Norðurlandahúsinum í morgin klokkan 10.

Trolaramenn hava sum flestu aðrir fiskimenn eisini havt inntøkuvøkstur í ár í mun til í fjør